11. apríl 2011

Tíðindaskriv

Faroe Petroleum býtir Maria oljufundið um við olju- og gassframleiðslu í Noregi

Faroe Petroleum boðar við hesum frá, at felagið hevur undirskrivað avtalu við Petoro AS, um umbýti av 30% ognarlutinum í norska Maria fundinum við ognarlutir í nøkrum olju- og gassframleiðslueindum í Noregi.

Avtalan í høvuðsheitum:

- Maria fundið verður býtt um við partar av Njord, Brage og Ringhorne East framleiðslueindunum, sum Petoro AS eigur
- Talan er um eitt 'reint' ognarumbýti, uttan peningaútjavnan
- Avtalan er galdandi frá 1. januar 2011
- Umbýtið økir um mettu framleiðsluna hjá Faroe Petroleum í 2011 svarandi til yvir 7.300 tunnir av olju, við møguleika fyri enn størri framleiðslu
- Íroknað framleiðsluna frá Blane loyvinum, metir felagið at miðalframleiðslan í 2011 verður 9.200 tunnur um dagin
- Umbýtið økir um mettu oljureservarnar hjá Faroe Petroleum við 14 mió tunnum
- Petoro AS varðveitir skyldurnar fyri framtíðar burturbeining av teimum umbýttu framleiðslueindunum, upp til NOK 600 mió (sum svarar til kr. 570 mió)
- Ognarumbýtið vísir, hvussu felagið umsetir góð leitiúrslit til pening innan stutta tíð – avtalan við Petoro varð gjørd bert 9 mánaðar eftir Maria fundið varð gjørt
- Umbýtið er í tráð við ætlanini hjá Faroe Petroleum um at vaksa um framleiðsluna fyri ein lágan prís
- Handilin ber við sær, at felagið sleppur undan útbyggingarkostnaðin av Maria fundinum, sum er mettur til umleið £280 mió (svarandi til kr 2.4 mia)
- Umbýtið økir um peningarenslið hjá felagnum, sum verður nýtt til framtíðarvøkstur

Petoro AS umsitur fíggjarligu ognarlutirnar hjá norsku stjórnini í olju- og gassleiðum á norska landgrunninum. Sambært avtaluni, býtir Faroe Petroleum 30% av Maria fundinum á loyvunum PL475BS og PL475CS, við fylgjandi ognir hjá Petoro AS:

- **Njord framleiðsluøki**
  - 7,5% av Njord leiðini og Njord framleiðslueindini (tó ikki Noatun fundið), og
  - 7,5% av loyvunum PL348 and PL348B, ið liggja nær við Njord, sum innihalda Gygrid útbyggingarverkætlanina og eitt annað leitimið.

- **Brage framleiðsluøki**
    - 14,2% av Brage leiðini og Brage framleiðslueindini, og
    - 13,4% av Brage Sognefjord leiðini.

- **Ringhorne East framleiðsluøki**
    - 7,8% av Ringhorne East leiðini og framleiðslueindini, og
    - 3,0% av Jotun leiðini og framleiðslueindini.

Óheftað verkfrøðingafelagið Senergy (GB) Limited hevur eftirkannað tær yvirtiknu ognirnar frá Petoro AS, og metir at per 1. januar 2011, vóru netto olju- og gassreservarnir hjá Faroe Petroleum 14 milliónir tunnir í teimum yvirtiknu framleiðsluøkinum, og 1,2 milliónir tunnir í Gygrid økinum, sum enn ikki er útbygt. Senergy váttar eisini, at møguleiki er fyri enn størri framleiðslu frá yvirtiknu ognunum. Miðalframleiðslan í 2010 frá Petoro A/S ognunum var 10.591 tunnir um dagin, og netto framleiðslan fyri januar 2011 var 11.962 tunnir um dagin. Miðalframleiðslan fyri 2011 er mett til 7.300 tunnur av kolvetni um dagin.

Njord og Gygrid (teigar 6407/7 og 6407/10)
Statoil (20%) er fyristøðufelag á Njord. Hini feløgini eru Faroe Petroleum (7,5%), E.ON Ruhrgas Norge (30%), GDF SUEZ E&P Norge (20%), ExxonMobil E&P Norway (20%) og VNG Norge (2.5%). Njord er útbygt við eini flótandi framleiðslueind. Framleiðslan byrjaði í 1997. Njord liggur nær við leitiloyvini á Halten Terrace, sum Faroe Petroleum eigur í Norska havinum. Oljan verður førd við tangaskipum, meðan gassið verður leitt við rørleiðingum til meginlandið. Meiri framleiðsla fer at koma frá"North West Flank" útbyggingini, ið longu er góðkend, og frá Gygrid útbyggingarætlanini, sum verður handað myndugleikunum í 2011 til góðkenningar. Íløguparturin hjá Faroe Petroleum verður goldin við peningarenslinum frá framleiðsluni. Snilehorn leitimiðið liggur eisini á økinum, og avgerð verður tikin í næstum um borast skal ella ikki á hesum leitimiðinum.

Brage (teigar 30/6, 31/4 og 31/7)
Statoil (32.70%) er fyristøðufelag á Brage. Hini feløgini eru Faroe Petroleum (14.25%), Spring Energy Norway (2.50%), VNG Norge (4.44 %), Noreco (12.25 %) og Talisman Energy Norge (33.84 %). Brage liggur í norskum parti av Norðsjónum. Framleiðslan byrjaði í 1993. Oljan verður leidd við rørleiðingum til Sture terminalin. Nýggjur 4D seismikkur verður skotin í 2011 fyri at finna út av, hvussu framleiðslan kann økjast. Arran leitibrunnurin, sum eisini er partur av avtaluni, verður boraður á økinum í løtuni.

Ringhorne East og Jotun (teigur 25/8)
ExxonMobil (77,38%) er fyristøðufelag á Ringhorne East. Hini feløgini eru Faroe Petroleum (7,80%) og Statoil (14,82%). Framleiðslueindin liggur í norska partinum av Norðsjónum. Framleiðslan byrjaði í 2006. Framleiðslan frá Ringhorne East verður flutt til Balder og Jotun framleiðslueindirnar. Ætlanin er at bora tveir brunnar fyri at økja um framleiðsluna eftir at 4D seismikkur er skotin á økinum. Jotun oljuleiðin er nær við Ringhorne East. Framleiðslan byrjaði í 1999, og framleitt verður við einari flótandi framleiðslueind. Framleiðslan nærkast endanum á Jotun leiðini.

Burturbeiningarskyldur
Petoro hevur átikið sær kostnaðin í sambandi við burturbeining av framleiðslueindunum upp til NOK 600 milliónir.

Maria

Maria er eitt stórt fund, sum boðað frá í juli mánaða 2010. Faroe Petroleum hevði 30% av loyvinum. Wintershall (25%), sum er fyristøðufelag, fyrireikar eina útbyggingarætlan til 2012/2013. Ein metingarbrunnur verður væntandi boraður seinni í 2011. Fram til 31 desembur 2010, hevði Faroe Petroleum gjørt íløgur fyri £5.0 mió (svarandi til kr. 42.5 mió) eftir skatt á Maria loyvunum.

Graham Stewart, stjóri hjá Faroe Petroleum, sigur í viðmerking, at Petoro avtalan veruliga vísir virðið av Maria fundinum, og eisini prógvar at leisturin, sum Faroe Petroleum arbeiðir eftir, riggar, tí bert eftir 9 mánaðum frá tí at Maria fundið varð gjørt, kann felagið býta fundið um við dygdargóða og langtíðar framleiðslu, uttan at rinda við tøkum peningi ella at gera útbyggingaríløgur. Nýggja støðan økir eisini um lánsmøguleikarnar hjá felagnum, samstundis sum at skyldurnar fyri burturbeining av framleiðslueindum eru avmarkaður. Handilin er í tráð við strategiina hjá felagnum um at optimera virðini hjá felagnum, og at styrkja um framleiðsluna fyri at fíggja komandi leitiverkætlanir. Av teimum 17 brunnunum, sum ætlanin er at bora frá 2011 til 2013, skulu 13 brunnar borast í Noregi. Fígging er tøk til allar 17 brunnarnar.

Faroe Petroleum er skrásett á AIM partabrævamarknaðinum í London, og hevur skrivstovur í Aberdeen, Stavanger og Tórshavn.

Fullfíggjað tíðindaskriv á enskum sæst á heimasíðu okkara www.fp.fo

Kort yvir loyvini í avtaluni við Petoro




Brage Unit
PL507 Tetrao
PL414 Kalvklumpen
Jotun Unit
Ringhorne Unit
Tórshavn
Stavanger
Aberdeen
Faroe Non-Operated
Petoro deal
Licences
0
20 km